P/F LUNA
Á Fútakletti 1
360 Sandavágur

Argir hin 17. mai 2023
Málsnr.: 23/00261-9
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting fyri sólorkuverk hjá P/F Luna á Fútakletti**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini, umhvørvisárinsmeting fyri sólorkuverk á tekjunum á smoltstøðini hjá P/F Luna á Fútakletti.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á náttúru, umhvørvi og onnur viðurskifti eru væl lýst, so at sleppast kann undan óvæntaðum avleiðingum av verkætlanini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 2. mars 2023 umhvørvisárinsmeting fyri sólorkuverk P/F Luna á Fútakletti.

## 2.1 Verkætlanarlýsingin

P/F Luna hevur ætlan um at leggja 6.000 sólkyknur á tøkini á smoltstøðini hjá P/F Luna á Fútakletti. Samlaða víddin av sólkyknunum er uml. 15.000 m$^2$, framleiðslumátturin uml. 2.500 kW og væntaða elframleiðslan uml. 1.300.000 kWt um árið, sum svarar til miðalársnýtsluna av elorku hjá uml. 300 húsarhaldum.

Yvirflatin á sólkyknunum er viðgjørd fyri at minka um endurskinið.



Mynd 1. Sólkyknur á tøkunum á smoltstøðini á Fútakletti

## 2.2 Umhvørvisárinsmetingin

Sólorkuskipanir kunnu hava ávirkan á náttúru og umhvørvi. Serliga kann talan vera um árin á landslagið og tað lívfrøðiliga margfeldið, har sólorkustøðir eru. Stórar sólorkustøðir tørva nógv lendi, og kunnu tí skaða náttúruna, tí tey taka búøki hjá plantum og djórum umframt at skemma landslagið.

Av tí, at sólkyknurnar verða lagdar á takið á verandi virkisbygningum, verður einki inntriv á náttúruna og landslagið.

Endururskin av ljósi frá sólkyknum kann vera til skaða fyri fugl. Vatnfuglur kann halda, at tær skyggjandi sólkyknurnar eru vatn, og kann vandi tí vera fyri samanbresti við sólkyknurnar, og at fuglurin fær skaða og ella doyr av hesum.

Kanningar benda tó á, at hesin vandin er lítil. Yvirflatan á sólkyknunum er viðgjørd fyri at minka endurskin, og minkar tað um vandan fyri samanbresti.

Endurskin frá sólkyknunum kann eisini vera til ampa fyri fólk, serliga í bústaðarøkjum. Eisini kann endurskin vera til ampa fyri ferðslu á vegum, á flogvøllum og á innflúgvingarleiðum til flogvøllir.

Útrokningarnar í árinsmetingini vísa, at sannlíkindi fyri ampum av endurskini í bústaðarøkjum og vegum er lítil. Eisini vísa útrokningarnar, at endurskin ikki er til ampa fyri innflúgving til flogvøllin í Vágum. Sólkyknurnar síggjast ikki úr torninum á flogvøllinum, og er tí eingin vandi fyri ampum av endurskini har.

## 2.3 Hoyring

Umhvørvisárinsmetingin varð lýst á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni 7. mars 2023. Freistin at koma við viðmerkingum var 4. apríl 2023. Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar.

Uppskot til góðkenning varð sent P/F Luna og Vága kommunu til viðmerkingar hin 24. apríl 2023. Freistin at koma við viðmerkingum var 15. mai 2023.

Hvørki P/F Luna ella Vága kommuna høvdu nakra viðmerking.

## 3. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá P/F Luna við hesi treyt:

- P/F Luna skal regluliga skráseta skaddan og deyðan fugl inni á økinum og á hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni eina uppgerð av skrásetingunum og møguliga frágreiðing.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

## 4. Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytir í hesi góðkenning verða hildnar.

## 5. Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir kæruna til landsstýriskvinnuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 14. juni 2023.

Møgulig kæra skal sendast við telduposti til us@us.fo ella sum bræv til Umhvørvisstovuna, Traðagøta 38, 160 Argir.

Sigga Jacobsen, deildarleiðari / Suni Petersen, málsviðgeri